# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*– Eg eri vanur við at fáa bank, tí eg havi altíð trena við tyngri vektflokkum. Tað kemur mær nú til góðar.*

*Sjúrður Berg við Nordjysk Stiftstidende*

## Badminton-úrslit

**Leygardagin 11.nov.2006 var Grand Prix kapping í badminton fyri U11, U13 og U15 í badmintonhøllina í Tórshavn.**

**BADMINTON**
*tíðindaskriv*

Grand - Prix kappingin er árliga landskappingin í badminton. Børn kappast her í einmansleiki, og verða leikararnir bólkaði eftir føðidegi og kyndi. Í hvørjum bólki avgerð styrkin hjá tí einstaka, um spælt verður í a, b, c, ella d raðnum.

**Úrslitin:**
**U11 gentir**
A-bólkin vann
Heidi C.Hansen, VÍF
B-bólkin vann
Kristina Eriken, HBF
C-bólkin vann
Elsa Maria Stórá, VÍF

**Dreingir:**
A-bólkin vann
Sámal Joensen, ÍF
B-bólkin vann
Martin Justinussen, HBF
C-bólkin vann
Egi K. Jurhuus, HBF

**U13 Gentir**
A-bólkin vann
Rannvá Carlsson, HBF
B-bólkin vann
Marita Atladóttir, VÍF

**Dreingir**
A-bólkin vann
Magni Hansen, ÍF
B-bólkin vann
Páll Eysturoy, HBF

**U15 Gentir**
A-bólkin vann
Guðrið Poulsen, VÍF

**Dreingir**
A-bólkin vann
Ári Ó. Ellingsgaard, ÍF
B-bólkin vann
Sverri S.Nielsen, MBF

**C-bólkin vann**
Fríði Atlason, HBF

**D-bólkin vann**
Ellindur G.Magnussen, HBF

15 ára gamli Sjúrður Berg:

# Svart belti í taekwondo

**Undir yvirskriftini »Lille mand – stor respekt« stendur grein at lesa í Nordjyske Stiftstidende, um 15 ára gamla Sjúrður Berg í Hirtshals, sum hevur fingið svarta belti í Taekwondo**

**TAEKWONDO**
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Sjúrður Berg er føroyingur, men hevur búð í Danmark síðani hann varð trý ára gamal. Hann býr í Hirtshals saman við mammuni, Joan Berg.

Sum tíggju ára gamal byrjaði Sjúrður at venja taekwondo. Síðani hevur hann ment seg støðugt, og er hann í dag tann yngsti taekwondoíðkarin í Norðurjyllandi, sum hevur fingið svart belti.

Sjúrður byrjaði at venja taekwondo saman við einum vinmanni. Foreldur teirra skiftust um at koyra teir báðar til venjing. Vinmaðurin gavst tó eftir ein tíð var liðin, men Sjúrður var treiskur og helt áfram. Júst treiskni og ídni hjá Sjúrða hava síðani komið honum til góðar. Tað staðfestir formaðurin í Hjørring Taekwondo Klub, Kent Sørensen, fyri Nordjyske Stiftstidende.

At evnini hjá Sjúrða eru eyðsýnd, er ikki yvir at dylja. Hóast lítil á vøkstri, so er hann høgt í metum millum limirnar í Hjørring Taekwondo Klub, har hann longu sum 14 ára gamal fekk svarta belti. Hjørring Taekwondo Klub hevur 35 limir, og Sjúrður Berg er saman við tveimum øðrum teir einastu har, sum hava svarta belti.

Við Nordjyske Stiftstidende sigur Sjúrður Berg, at hann altíð hevur vant saman við teimum, ið eru í hægri vektflokki enn hann sjálvur, og tað er komið honum til góðar seinni. Sjúrður Berg staðfestir eisini, at tað ikki kynstrið at sláa, sparka ella verja seg, sum eru drívmegin hjá honum. Harafturímóti er tað samanhaldið og vinarlagið í Hjørring Taekwondo Klub.

Í Føroyum er onki taekwondofelag. Tað nærmasta hesum í Føroyum, er Judo. 25 ár eru síðani Judosamband Føroya var stovnsett, og í dag eru tvey judofeløg í Føroyum – Sunda Judofelag og Havnar Judofelag. Íðkararnir í hesum feløgunum fyrireika seg nú so smátt til oyggjaleikirnar á Rhodos komandi ár. Ein partur av hesum fyrireikingum eru kappingar uttanlands, og 25. november skal judolandsliðið til Danmarkar at luttaka í kapping í Hillerød.


SEJR UDEN AT VÆRE PRANGENDE
AaB sikrede sig - lettere humpende - tre point til tavlen, da bundholdet Silkeborg blev sendt hjem med et 1-0 nederlag i bagagen. Side 2 og 3
FOTO: GRETE DAHL
NORDJYSKE STIFTSTIDENDE MANDAG 30. OKTOBER 2006 4. SEKTION
Sport
15 år er denne unge mand - Sjurdur Berg fra Hirtshals. Men hans unge alder til trods står der stor respekt om ham i Hjørring Taekwondo Klub. Den unge idrætsudøver har nemlig - som en af meget få indenfor sin sportsgren - opnået at få det sorte bælte allerede inden han fyldte 15.
FOTO: MARTIN DAMGÅR
Sort bælte i en ung alder

*Í Nordjyske Stiftstidende er ein stór grein um Sjúrður Berg í Hirtshals, sum fekk svarta belti í taekwondo sum 14 ára gamal*

Mjølnir-TB 0-3 (20-25, 10-25, 23-25)

# TB hongur í oddinum

**TB kom aftur á røttu kós í meistaradeildini hjá kvinnum, tá tær vunnu tryggan sigur á Mjølni í KÍ-høllini sunnudagin**

**FLOGBÓLTUR**
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Síðsta vikuskiftið tapti TB toppdystin á Giljanesið ímóti Drátti. Tí skuldu tær nú royna at koma aftur á rætta kós, og hetta skuldi henda sunnudagin, tá tær vitjaðu í Klaksvík hjá Mjølni. Mjølnir fekk síni fyrstu stig síðsta vikuskiftið, tá tær heldur óvæntað vunnu í Kollafirði, tí var ætlanin hjá Mjølni helst at vinna sín næsta dyst á rað.

Men tað var tó týðiligt, hvat av hesum liðunum er oddalið, og hvat er botnlið. Sjálvt um munurin ikki var tann størsti í fyrsta settið, so megnaði TB at vinna hetta 20-25. Í øðrum setti var eingin slingur í valsinum. TB snøgt sagt hølvaði Mjølnir av. Úrslitið av hesum settinum var 10-25, og nú sá ikki gott út hjá Mjølni. Um tær skuldu gera sær nakrar vónir um at vinna dystin, so skuldi triðja sett vinnast.

Tær stríddust eisini fyri møguleikanum, men enn einaferð gjørdist TB drúgvari. Kvinnurnar av Tvøroyri vunnu triðja sett 23-25.

Við sigrinum er TB komið aftur á rætta kós, og tær hava lagt seg undir liðuna á ÍF á øðrum plássi, bert 2 stig aftanfyri Drátt. Mjølnir liggur enn aftast við tveimum stigum.